*25 útlendsk og 2 føroysk oljufeløg liggja framvið:*

# Seks altjóða samtøk við 18 oljufeløgum vilja leita eftir olju



*Umboð fyri Phillips Petroleum saman við fólkum frá Oljufyrisitingini*

JAN MÜLLER

Tvey av heimsins størstu oljufeløgum, tað amerikanska Phillips og tað franska ELF hava gjørt samstarvsavtalu um at vera við í leitingini eftir olju og gassi á føroyskum øki og í Hvíta økinum millum Føroyar og Hetland.

Avtalan varð undirskrivað 21. mai og fevnir hon um eitt øki 65000 kvkm til støddar í føroyskum øki og í Hvíta økinum. Phillips og Elf fara saman at kanna møguleikarnar at finna olju og gass í hesum stóra øki og ætla eisini saman at lata inn umsókn um at sleppa at bora eftir kolvetni.

Í einum tíðindaskrivi frá feløgunum stendur, at feløgini eru samd um at menna eitt sera neyvt og tætt langtíðar samstarv. Feløgini byggja m.a. hetta nýggja samstarvið á væleydnaða úrslitið frá lisensrundini í írskum øki í fjør.

Sagt verður, at feløgini ætla sær at vera við í fyrstu lisensrundini á føroyskum øki, sum er væntast at verða kunngjørd seint í 1998 ella tíðliga í 1999. Hvat viðvíkur fyrstu lisensrundini í Hvíta økinum, so verður hon tá stjórnirnar í Føroyum og Bretlandi eru komnar ásamt, hvør eigur hvat av økinum.

Við hesum eru ikki færri enn 6 samtøk við 18 oljufeløgum á føroyskum øki. Hesi eru:

1. Statoil, Mobil og Enterprice.
2. Amerada Hess, Lasmo, DONG og Norsk Hydro,
3. Texaco, Conoco og Murphey Oil,
4. Amoco, Fina, Mærsk Olie og Gas og Deminex,
5. Shell og BP,
6. Phillips og ELF

Síðani eru fleiri feløg, sum enn ikki hava kunngjørt alment, um tey fara saman við øðrum feløgum og hvørji hesi eru. Hesi feløgini eru: Arco, Marathon Oil, Saga, Total, Anadarco, Agip og Esso.

Afturat hesum koma tey bæði føroysku oljufeløgini Atlants Kolvetni (Atlantic Petroleum) og Føroya Kolvetni, sum enn ikki hava gjørt av, hvat oljusamtak tey ætla at fara inn í samstarv við.

# Sjey føroyingar í starvsvenjing hjá danska DONG

*Tað er vorðið alt meira vanligt, at útlendsk oljufeløg seta føroyingar í starv. Oljusamtakið „Faroes Partnership" byrjaði herfyri eina lýsingarherferð fyri at fáa føroyingar í starvsvenjing hjá feløgunum í samtakinum. Úrslitið er, at sjey føroyingar skulu í starvsvenjng hjá DONG*

JAN MÜLLER

Ikki færri enn sjey føroyingar hava fingið játtaða starvsvenjing hjá danska oljufelagnum DONG. Danska felagið lýsti herfyri í føroysku bløðunum eftir tveimum føroyingum at seta í sokallað „trainee" størv. Tvs. at teir arbeiða hjá felagnum í eina avísa tíð fyri harvið at kunna seg við, hvussu eitt oljufelag arbeiðir.

-Vit eru sera ovfarin av og fegin um, at so nógvir kvalifiseraðir føroyingar søktu størvini sigur Bodil Jensen, starvsfólkaleiðari hjá DONG.

Meiri enn 30 føroyingar søktu, og tá so stórt tal av teimum, sum vóru til samtalu, vístu seg at vera sera væl egnaðir, gjørdi leiðslan í DONG av at taka sjey fólk. -Hetta gjørdu vit fyri at geva uppaftur fleiri føroyingum møguleikan til at „snodda" til hvat hendan vinnan hevur at bjóða uppá sigur Bodil Jensen.

Teir sjey føroyingarnir, sum nú fáa boðið stuttíðarstarv hjá DONG fevna rættuliga víða innan oljuvinnuna - frá búskaparfrøðingum og sakførarum til jarðfrøðingar og verkfrøðingar.





Teir koma nú at arbeiða á teimum ymsu deildunum hjá danska oljufelagnum. Teir fyrstu føroyingarnir taka við starvinum longu um ein mánað og verða teir í starvinum í millum 3 til 6 mánaðir.

DONG er móðurfelagið í einum samtaki, hvørs arbeiðsøki er leiting eftir olju, framleiðsla flutningur og keyp og søla av olju og náttúrgassi. Í samtakinum arbeiða umleið 400 fólk. Í 1997 hevði samtakið ein umsetning uppá 7,5 mia. kr. Eftir skatt varð úrslitið góðar 1,3 mia. kr. Danski staturin eigur øll partabrøvini í DONG.

DONG er eisini við í oljusamtakinum „The Faroes Partnership", sum fevnir um Amerada Hess, Lasmo og Norsk Hydro. Samtakið ætlar sær at vera við í 1. lisensrundu við Føroyar, tá hann verður.

Eisini hini feløgini í samtakinum arbeiða miðvíst við at útvega føroyingum arbeiði ella starvsvenjing. Herfyri lýsti LASMO eftir tveimum føroyskum „Trainess". TEir verða settir skjótt. Norsk Hydro fer eisini at lata dyrnar upp fyri føroyingum í næstum, meðan Amerada Hess longu hevur fleiri føroyingar í arbeiði, onkur í føstum og onkur í starvsvenjing.



# Fleiri nýggj forkanningarloyvi

JAN MÜLLER

Oljufyrisitingin hevur í ár latið trý nýggj forkanningarloyvi, soleiðis at tað í løtuni eru tilsamans 9 kanningarloyvi til útlendskar fyritøkur á føroyskum øki.

Her er talan um kanningar í sambandi við eina komandi oljuleiting við Føroyar. Tey trý nýggju loyvini eru latin til Veritas DGC Lmt við heimstaði í Bretlandi, síðani til Amerada Hess eisini í Bretlandi og norska felagið Surface Geochemical Services AS. Hetta síðsta felagið gjørdi sera áhugaverdar botnkanningar á føroyaleiðini í fjør.

Hini feløgini, sum hava forkanningarloyvi, eru: Saga Petroleum, Noreg, PGS Reservoir AS, Noregi, Geco Prakla, Bretland, Arco Faroes Lmt. USA, Shell í Bretlandi og Oilserarch í Bretlandi.

Í fleiri førum er talan um seismiskar kanningar, men tað snýr seg eisini um kanningar á landi av eitt nú gróti og undirlendinum. Somuleiðis leiting eftir oljublettum á havyvirflatuni.